# Spurningar og svar til kravfesting dagfest 4. septembur 26

## Hosting, rakstur og SLA

1 Hvat rakstrarumhvørvi letur Landsnet til taks, tvs. rakstrarskipan, webservara, PHP-útgávu og datubaseservara?

**Svar: Servarar á Landsnet verða hýstir í Landsnet umhvørvinum á Elektron. KT Landsins krevja, at ein webservari og ein databasi servari verða gjørdir, fyri at verja í móti, at dátur verða gjørdar sjónligar ímóti internetinum.**
**Fyri uttan hetta krav, far tænastuveitarin admin atgongd til servaran og kann seta upp alt tað, ið veitarin hevur tørv á fyri at veita sína tænastu.**
**Veitarin velur sjálvur, um servarin skal hava eina Windows ella Linux stýrisskipan.**
**Trygdardagføringar av stýrisskipanum, verða vanliga gjørdar av Elektron í samstarv við stovnin og tænastuveitaran.**
**Veitaran skal tó fyrihaldaseg til hvussu nógv RAM, CPU og diskpláss servarin skal hava og eisini hvussu sambond verða knýtt inn og úr servarunum, so skilhaldsreglar um net trygd verða hildnar.**
**Elektron umsitur firewall til Landsnet hýsing umhvørvi og ger eisini penetration tests.**

2 Stuðlar umhvørvið containarum og sjálvvirkandi deployment?

**Svar: Ja, um veitarin hevur sett hetta rætt upp.**

3 Kunnu vit fáa ein tekniskan kontaktpersón hjá Landsnet, áðrenn tilboðsfreistin er úti?

**Svar: Allir spurningar í samband við útboð skuldu setast innan spurnarfreis 20. august. Veitarar fáa ikki kontaktpersón hjá Landsneti fyrr enn Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur tikið av tilboð hjá viðkomandi.**

4 SLA-listin frá KT Landsins fevnir um fysiska trygd, køling, streym, eftirlit og patching av pallinum.
Vit skilja tað soleiðis, at ábyrgdin fyri hesar liðirnar liggur hjá Landsnet. Kann HFS vátta hetta?

**Svar: Allir servarar í Landsnet umhvørvinum eru virtuellir. Elektron umsitur alt viðlíkahald av umhvørvinum.**

5 Fevnir okkara SLA tá bert um applikatiónslagið, tvs. trygdardagføringar av applikatiónini, hendingaloggar og svartíð?

**Svar: Tænastuveitarin eigur bert ábyrgdana av tænastum/applikatiónum á servaranum. Her undir kemur eisini dokumentatión av uppsetan. T.d. upplýsingar til firewall reglar og lýsing av uppsetan (Hetta verður ofta spurt inntil, tá trygdardagføringar skulu gerast á net ella stýrsskipan)**

6 Verða menningar- og royndarumhvørvi latin til taks umframt framleiðsluumhvørvið, og hvør ber kostnaðin av teimum?

**Svar: Tað verður ikki mett at heimasíðan er tøkniliga so útbygd, at neyðugt er við einum royndarumhvørvi.**

7 Vit ganga út frá, at penetratiónsroyndir verða bílagdar og hildnar av okkum sum ein partur av veitingini. Eru krøv til umfang og metodu í royndini, til dømis ein viðurkendan standard ella ein góðkendan royndarveitara?

**Svar: Elektron veitur penetratión testir, sum eyka tænasta til HFS, sum partur av hýsingini. Men tilboðsveitarin skal sjálvur rætta møgulig frávik og bera kostanðin av møguligum frávikum. Og eisini bera kostnaðin av møguligum eyka pen test, sum krevjast í samband við at tryggja at frávik eru rættað.**

8 Hvussu ofta verður væntað, at royndin verður endurtikin, eftir at loysnin er sett í gongd?

**Svar: Penetratiónstest verður gjørd árliga. Og um frávik vera staðfest, so eisini eftir at hesi eru rætta.**

9 Krevur Landsnet skrivliga góðkenning og eina avtalað roynd, áðrenn penetratiónsroyndir fara fram, og hvør samskipar góðkenningina?

**Svar: Reglulig penetratiónstest verður samskipað millum Kt landsins og Elektron. Møgulig eyka penetratiónstest eftir staðfest frávik verður samskipa millum tilboðsveitara og KT Landsins ella Elektron.**

10 Skal royndarfrágreiðing og rætting av feilum bert frágreiðast HFS ella eisini KT Landsins, og verður væntað, at ein endurroynd er íroknað í veitingini?

**Svar: Endurroynd skal gerast um frávik vera staðfest. Veitarin ber kostnaðin av at rætta feilir og av nýggjari pentest.**

11 Hevur HFS krøv til uppetíð og svar- og endurreisingartíð, sum skulu vera partur av SLA'ini?

**Svar: HFS ynskir, at SLA'in ásetur leiðbeinandi krøv til uppetíð, support og endurreising. Heimasíðan skal hava eina høga og støðuga uppitíð, t.d. minst 99,5 % árliga. Ætlað viðlíkahald skal, so vítt gjørligt, fara fram uttanfyri vanliga arbeiðstíð og fráboðast frammanundan. Vanligir fyrispurningar og minni broytingar verða svarað innan 1–2 arbeiðsdagar. Um heimasíðan er óvirkin, skal veitarin reagera skjótast gjørligt. Alt eftir tíðspunkt og avtalu, t.d. innan 2-4 tímar, við styttri reaktiónstíð í arbeiðstíð enn uttanfyri arbeiðstíð.**

12 Svarið frá 23. juli sigur, at samskifti og uppseting mótvegis Landsnet liggur hjá veitaranum. Hvør hjá Landsnet hevur heimild til at góðkenna broytingar í umhvørvinum, og hvørja svartíð kunnu vit rokna við?

**Svar: Tær einastu broytingarnar, ið skulu ígjøgnum KTL, eru uppsetan av veitara VPN og broytingar í Firewall rules og uppsetan. Hesar broytingar eiga ikki at fyri koma ofta og svar tíðin er "best effort". Svartíðin, tá feilir fyrikoma, kann finnast her: https://gjaldstovan.fo/Gjaldstovan/taenastur/kt-skivan/**

# Atgongd, innritan og menningartreytir

13 Hvat teknologi liggur aftanfyri Active Directory-atgongdina via Landsnet, og hvør protokollur verður latin til taks: SAML, OIDC ella LDAP?

**Svar: Brúkarir nýta OIDC at rita inn umvegis Entra, ið KT Landsins umsitur**

14 Er krav um innritan frá Landsnet og frá føroyskari IP-adressu eisini galdandi fyri okkara menningarfólk og supportstarvsfólk?

**Svar: KT Landsins gevur veitaranum atgongd via eitt VPN, ið Formula umsitur. Hetta VPN er síðan knýtt at einum Entra brúkara, ið KT Landsins umsitur. Hetta VPN gevur veitaranum atgongd frá allari verðini. Øll, ið hava atgongd, skulu hava sín egna brúkara.**

15 Finst ein góðkend atgongd, til dømis VPN ella jump host, til ein veitara uttan fysiska hjáveru í Føroyum?

**Svar: sí svar omanfyri.**

16 Hvussu nógvir ritstjórar skulu brúka loysnina, og hvussu nógv atgongdarstig skulu setast upp?

**Svar: Væntandi verður talan um uml. 15 brúkarar. Eitt adminstøðið, ið skal hava atgongd til dátur og sniðgeving og alt sum ritstjórastøðið hevur atgongd til. Og eitt ella tvey ritstjórastøðið (um tað gevur meining at loyva nøkrum at gera meiri í mun til sniðgeving o.tíl, men ikki hava atgongd til dátur), ið skal kunna upprættað síður út frá templates og skriva/rætta í teksti á síðum.**

# Dátuintegratión

17 Svarið frá 23. juli sigur, at veitarin tekur sær av samskifti og uppsetan viðvíkjandi dátusambondunum. Vit skilja tað soleiðis, at vit eiga uppsetanina á heimasíðuni, meðan sjálvur útdrátturin frá journalskipanini til JSON-fílur á millumservara verður settur upp og hildin við líka av veitaranum av journalskipanini. Kann HFS vátta hesa avmarking?

**Svar: Veitararnir av journalskipanini og Aliskipanini standa fyri úrdráttinum av dátum frá skipanunum og lata tær inn á millumservara. HFS stendur fyri júst hvørjar dátur skulu trekkjast úr, og rindar fyri gjøld í tí sambandi.**

**Heimasíðuveitarin fær atgongd til millumservaran og stendur fyri uppseting til móttøku av dátum úr journalskipanini og yvirføring til heimasíðuna. Vit vænta at hetta er partur av tilboðnum, umframt møguligt samskifti, ið stendur av at fáa sambond millum skipanirnar at virka, eisini skal vera partur av tilboðnum**

**Sí eisini skitsu**




**18** Er JSON-bygnaðurin ásettur í dag, og kunnu representativar dømisfílur latast okkum áðrenn tilboðsfreistin? Uttan tær kunnu vit ikki meta um umskapanar- og váttanararbeiðið við rímiligari nágreini.

**Svar: Vit veita ikki representativar dømisfílur. Verandi listar á heimasíðuni kunnu brúkast sum fyrimynd. Sí fylgiskjal við yvirlit yvir listar.**

**19** Hvussu nógvar listar skulu samtengjast í fyrstu veiting, og hvussu stórar eru tær mátaðar í røðum og feltum?

**Svar: Sí fylgiskja við yvirlit yvir listar**

**20** Er bygnaðurin líka á tvørs av listunum, ella hevur hvør listi sítt egna snið?

**Svar: Sí fylgiskja við yvirlit yvir listar**

**21** Hvørja markamót vísir Aliskipanin, tvs. bókingarskipanin: REST, SOAP ella beinaleiðis dátugrunnsfyrispurningar, og finst tað dokumentatión?

**Svar: Viðvíkjandi tilboðnum kann markamóti við Aliskipanina metast um á sama hátt sum markamót við Skjalahald, sí sp.17. HFS er í gongd við at kanna um hóskandi og dagført markamót (t.d. REST API ella SOAP) er sett upp í Aliskipanin. Um dagførd uppsetan av markamóti krevst, so verður hetta avroknað serskilt, annaðhvørt við veitaran av aliskipanini ella við heimasíðuveitarin.**

23 Hvør hevur ábyrgd av at halda markamótið við líka, og eru avmarkingar á tal av fyrispurningum?

Svar: **Sjálvur millumservarin verður veittur av KT landsins umvegis teirra veitara. Tekniska ábyrgdin (at hann koyrir, trygd osv) liggur hjá teimum. Sjálv uppseting av servaranum, so hann megnar at taka ímóti dátum frá journalskipan og aliskipan, og heimasíðan kann lesa dátur haðani, er ábyrgdin hjá tilboðsveitaranum.**
**Avmarkingar eru ikki ásettar á tala av fyrispurningum, men væntað verður at tilboði fevnir um sama tal av fyrispurningum, sum verandi heimasíða, og at nýggir fyrispurningar sum eru eins og teir, er við í tilboðnum. Skulu nýggj dáta á heimasíðuna eftir tilboðspartin, verður hetta gjørt til upplýsta tímaprís fyri víðari mennig, um annað ikki er avtalað.**

24 Er ætlað at skifta út ella dagføra journalskipanina ella Aliskipanina tvey tey komandi árini?

**Svar: Nei, tað eru ikki ætlanir um at skifta skipanir.**

25 Hevur HFS Power BI-lisensir í dag, og hvat slag?

**Svar: Vit hava gratis og pro lisensir.**

26 Skulu Power BI-frágreiðingarnar mennast av HFS ella av okkum, og skal ein embedded-lisens vera partur av kostnaðaryvirlitinum?

**Svar: Møguligar Power BI- frágreiðingar verða sum útgangsstøðið mentar av HFS. Um tær verða mentar av øðrum, er hefta eftir avtalu og gjald til viðkomandi veitara. Í løtuni er einans talan um møguliga grafiska vísing av almennum tølum, og tað er ikki mett neyðugt við embedded lisens.**

27 Finst tað kort- og geodáta fyri firðir, støð og alistøð til Føroyakortið, hvør veitir tey, og eru lisenskostnaðir?

**Svar: Hesar dátur liggja hjá US. Møguligir lisenskostnaðir verða avgreiddir millum HFS og US.**

28 Skal atgongd til Brá.fo, Aliskipanin og Labvantage vera um leinkjur frá hfs.fo, ella verður væntað ein djúpari integratión?

**Svar: Atgongdin skal vera ein leinkja, ikki integratión**

# Innihald og migratión

28 Hvussu nógvar síður og hvussu nógvar dokumentfílur eru á hfs.fo í dag, og hevur HFS eina yvirlitsuppgerð yvir tær? Umfangið av migratiónini er tann einstaki liðurin, sum ávirkar prísin mest.

**Svar: Vit hava ikki yvirlitsuppgerð yvir síður og dokumentfílur.**

**Eitt vegleiðandi yvirlit yvir høvðussíður sæst á hfs.fo > um okkum > sitemap. Tað er tó talan um fleiri síður samlað, tí nakrar av hesum hava undirsíður (ella fleiri "tab"), ið ikki síggjast á sitemap..**

29 Hvussu stórur partur av pdf-tilfarinum skal umskrivast til vevsíður, og hvør skrivar tann nýggja tekstin?

**Svar: Væntandi verða eini 10-20 pdf fílur umskrivaðar til vevsíður at byrja við. Orðingin í pkt. 2 í kravfestingini er tikin við, fyri at lýsa at komandi heimasíðan ikki á sama hátt sum verandi, verður uppbygd kring pdf skjøl, men skal vera ein heimasíða við integreraðari informatión. Pdf. fílur, sum eru t.d. publikatiónir/rapportir vera framvegis verandi sum pdf.**

**Vit vænta at partur av yvirføringini av tilfari frá skjølum til vevsíður verður gjørdur av veitara (um til ber at kopiera tekstin), og at tilboðsveitari tekur sær av at fáa uppseting tillagaða og snøgga, men ikki arbeiðir við at broyta tekst.**

30 Um vit skriva tekstin, hvussu nógv skjøl snýr tað seg um?

**Svar: Talan verður ikki um at skriva nýggjan tekst, men einans um yvirføring frá skjølum til vevsíður og harav broytingar í snið/layout. Sí svar til spurning 29.**

31 Hvussu stórur partur av heimasíðuni skal vera á enskum, og hvør veitir umsetingina?

**Svar: sí ensku útgávuna av verandi hfs.fo. Tað er ikki prioriterað at byja við at útbyggja enska partin. Men verandi enski partur skal yvirførast á nýggju heimasíðuna. GG! At tann eini listin, sum eisini er á føroyskum, her er tøkur í enskari versión. HFS stendur sjálvt fyri umseting.**

32 Skal leitingin fevna um innihald í viðheftum skjølum, eisini scannaðar pdf-fílur, sum krevja tekstkenning (OCR)?

**Svar: Leitingin skal kunna leita í skjølum sum pdf og word. Tó, um talan er um skannaðar fílur (oftast eldri tilfar), sum krevja tekstkenning, so er ikki neyðugt at hesi eru við í leitingini.**

33 Skal dáta úr listunum kunna finnast við tí generellu leitingini?

**Svar: Í generellu leitingini verður ikki væntað, at til ber at leita í innihaldi í listum. Men tá ein er á síðu við einum lista skal leitifelti vera tilknýtt, so til ber at leita í listanum (eins og á verandi heimasíðu) eins væl og at skipa/sortera dáturnar eftir t.d. fallandi vaksandi løggildingarnr., navn í bókstavarað, á kinalista ella ikki os.v**

# Talgild oyðubløð

34 Hvussu nógv oyðubløð skulu vera í fyrstu veiting?

**Svar: Hetta er ikki ásett, men vit ætla at gera nakrar royndi við t.d. oyðublað til umsókn um**

**løggilding, og møguliga eisini innflutningi av kettum og hundum. Sí eisini viðmerking niðanfyri og spurning 57.**

35 Kunnu tey mest kompleksu oyðubløðini latast sum dømi, tvs. tey við fíluopplesti, treytaðum feltum ella fleiri stigum?

**Svar: Eitt dømi um oyðublað við treytaðum feltum og fílum er á HFS.fo > matur og matvøruframleiðsla> Oyðubløð ligga t.d. nøkur umsóknarbløð. Taka vit umsóknarblað til løggilding og skráseting, so skulu øll feltir útfyllast. Og pkt 4 og 5, har skal min 1 krossast av í hvørjum, men fleiri kunnu krossast av. Pkt 7 vísur at 3 ávís skjøl skulu leggjast, tekningar (kann vera meiri enn ein fíla), reinhaldsætlan (1 fíla) og matarskrá ella líknandi (1 fíla). Umframt møguligar eyka fílur (evt. upp til 10).**

**Vit vænta ikki at talgild oyðubløð eru klár at taka í brúk beinavegin heimasíðan fer í luftina. Hetta skal vera ein møguleiki sum heimasíðan kann veita, og sum vit menna sum part at veitingartilgongdini, sí eisini svar 46.**
**Í fyrstu atløgu verður helst eisini talan um eina einfalda "talgild" oyðubløð loysn, ið mest er ein hjálp fyri brúkaran heldur enn HFS. Tvs. at brúkarin sleppur undan at prenta/downloada eina fílu, útfylla og senda til HFS. Men heldur útfylla á netinum, uploada fílur, (evt. vátta við tlfnr.) og so trýstur á send. HFS kann so móttaka hetta á onkran hátt, t.d. við email.**
**Vit ynskja at tryggja, at tekniska uppsetingin er gjørd, so vit kunnu fáa upplýsingar í ein SQL databasa seinni.**

36 Finst SQL-dátugrunnurin fyri oyðubløðdáta longu, hvar er hann settur, og hvør umsitur hann?

**Svar: Sí svar 35 og 37.**

37 Skulu innsend oyðubløð journalførast aftur í journalskipanina, ella er SQL-dátugrunnurin endin?

**Svar: SQL-dátugrunnur er ikki uppsettur. Ætlanin er at oyðubløð skulu kunna journalførast automatiskt uppá sigt. Sí spurning 57.**

38 Hevur HFS eina avtalu um sms-gateway til váttan við telefonnummari, ella skulu vit koma við loysnini og kostnaði?

**Svar: HFS hevur ikki avtaluð um sms-gateway til váttan av telefonnr í samband við útfylling av oyðubløðum. Møgulig loysn og kostnaður er ynskiligt.**

39 Kortgjaldið verður lýst í svarinum frá 23. juli sum eitt víðkað talgild oyðubløð, har brúkarin sjálvur skrivar upphædd og lýsing inn. Gjøldini fella HFS til, og vit ganga tí út frá, at HFS er gjaldsmóttakari og hevur innloysingaravtaluna. Kann hetta váttast, og hevur HFS ynski um ein ávísan gjaldsveitara?

**Svar: Vit ynskja upplýst møguliga loysn og kostna fyri eina einfalda gjaldsloysn. Vit hava ikki ynski um ávísan gjaldsveitara, men talan skal vera um trygga loysn. Gjøld til HFS fara ikki beinleiðs til**

**HFS, men til Gjaldsstovuna, og tí er týdningarmikið at eyðmerkingin er greið, so tað er tíðiligt hvat gjaldið er fyri og til hvønn (HFS).**

40 Er krav um, at ávís oyðubløð ikki kunnu sendast inn fyrr enn, uppgivin upphædd er goldin, partur av fyrstu veiting ella í seinni veiting?

**Svar: Gjaldsloysn er ætlað sum menningarmøguleiki. Av somu orsøk, er onki sum er tengt at gjalding partur av fyrstu veiting. Ætlanin er einans at heimasíðan tekniskt skal kunna útbyggjast til hetta.**

# Tilboðsform, fíggjarviðurskifti og eftirmeting

41 Verður væntað ein fastur prísur fyri alla veitingina, ella verður ein fastur prísur góðkendur fyri eitt avmarkað umfang saman við eini metingar- og tímaprísi fyri tær partar, sum eru heftar av markamótum hjá triðjaparti?

**Svar: Vit ynskja ein prís fyri tað, ið er høvðusinnihaldi á heimasíðuni, eins og lýst í kravfesting. Sum greitt frá undir markamótum/millumservara verður vænta at uppseting her, og samskifti við viðkomandi partar er partur av tilboðnum, soleiðis at tann endaliga veitingin og kostnaðurin er ein heimasíða við dátum úr ali- og jounalskipan (umvegin millumservaran). Menningarmøguleikar skulu vera fyri seg, har er metingarprísur/tímar nøktandi.**

42 Hvussu verður kostnaðarparturin á 50 prosent mettur: bert út frá tilboðsupphæddina fyri stovnan, ella verða leypandi kostnaðir sum lisensir, viðlíkahald og tímaprísur fyri víðari menning tiknir við?

**Svar: Í kravfesting hava vit biðið um kostnaðaryvirlit. Tað kann vera fyrimunur at hava nágreina, hvørjir ymisku postarnir í kostnaðinum eru. Eisini verður væntað at í kostnaðaryvirlitinum sæst hvat evt. mánaðarligt gjald er, og hvat er gjaldið er fyri.**
**Harumframt hava vit biðið um "*Tímaprís fyri víðari menninga av heimasíðuni, út yvir innihald í tilboði, komandi árið*".**
**Kostnaðarmetingin tekur sostatt støði í bæði stovnan, mánaðarligum kostnaði og tímaprís fyri víðari menning. Um kostnaðurin hjá ymisku tilboðsveitarunum er upplýstur ymiskt, verður leistur gjørdur, so prísirnir kunnu samanberast.**

43 Prísurin fyri kortgjald skal upplýsast serstakt, sbrt. svarinum frá 23. juli. Er tann serstakt upplýsti prísurin partur av prísmetingini uppá 50 prosent?

**Svar: Prísmetingin á 50 % er við útgangsstøðið í grundtilboðnum, t.v.s. uttan tað sum er sett sum møguligar funktiónir seinni (AI og gjaldsfunktión). Vit ynskja tó, at heimasíðan reint teknist er før fyri at fáa hesar eykafunktiónir. Prís og góðskumeting av møguligum eykafunktiónum verða tikin við, um tilboðsveitarar annars liggja javnt.**

44 Skal AI-samrøðutólmenni (chatbotturin) fáa ein prís settan í tilboðnum, og verður hesin í so fall ein partur av prísmetingini?

**Svar: Ja, ein meting av kostnaðinum kann setast í tilboðið, men prísmetingin er samsvarandi svar 43.**

45 Hvørjar leypandi triðjapartskostnaðir ynskir HFS upplýstar, til dømis ReadSpeaker, leititeknologi, vitjanartøl og oyðublaðsloysnir, og hvør hevur ábyrgd eftir at loysnin er sett í gongd?

**Svar: Sí sp. 42. Allir kostnaðir, ið veitarin stendur fyri í samband við heimasíðuni skulu upplýsast. Um ávísir kostnaðir eru fluttir yvir á HFS, skal hetta sjálvsagt upplýsast.**

# Tíðarætlan og egið tilfeingi hjá HFS

46 Er tað ein ynskt ella bindandi ígongusetingardagfesting, og hvat verður væntað latið í 2026 og hvat í byrjanini av 2027?

**Svar: Talan er um ynskta byrjanardagfesting. Ætlandi er funnið fram til snið, og í minsta lagi gamla heimasíða yvirførd á nýtt snið við virkandi leitifunktión í 2026, og meðan tað "nýggja" kann avheindast í 2027.**

47 Tíðarætlanin er, út frá okkara royndum, meira heft av egnum tilfeingi hjá kundanum enn av veitaranum. Hvør er fasti verkætlanarleiðari hjá HFS, og hvørjir ritstjórar kunnu setast av til innihaldsarbeiðið?

**Svar: Hesir upplýsingar verða veittir tá tikið er av tilboð. Talan verður um fleiri fólk frá ymiskum deildum, ið lutvíst koma at sita við uppgávuni.**

48 Hvussu fer góðkenning av design og innihaldi fram, og hvør tekur avgerðina?

**Svar: Ein bólkur er settur við umboðum fyri deildirnar, ið saman viðgerð design og innihald.**

49 Hvussu nógvar endurskoðanarumfør eru væntaðar til designuppskotið?

**Svar: Vit ganga út frá at minimum trý endurskoðanarumfør av design eru við í tilboðnum. Men veitarin er vælkomin at lýsa hvør designtilgongd er partur av tilboðnum.**

# Blandaðir spurningar

50 PDF-tilfar og innihaldsarbeiði
Er tað HFS, sum ornar og klárger alt tilfar til nýggju heimasíðuna, ella skal veitarin eisini hjálpa við innihaldsarbeiði? Her hugsa vit eisini um arbeiðið at flyta innihald úr PDF-fílum til vanligt heimasíðuinnihhald.

**Svar: Vit vænta ikki at veitarin hjálpur við innihaldsarbeiði annað enn náttúrlig yvirføring og møgulig grovsortering av verandi tilfari yvir á nýggju heimasíðuna. Sum partur av hesum verða væntandi verða eini 10-20 pdf fílur umskrivaðar til vevsíður at byrja við. Orðingin í pkt. 2 í kravfestingini er tikin við, fyri at lýsa at komandi heimasíðan ikki á sama hátt sum verandi, verður uppbygd kring pdf skjøl, men skal vera ein heimasíða við integreraðari informatión. Pdf. fílur, sum eru t.d. publikatiónir/rapportir vera framvegis verandi sum pdf.**

**Vit vænta at partur av yvirføringini av tilfari frá skjølum (pdf, word) til vevsíður verður gjørdur av veitara (um til ber at kopiera tekstin), og at tilboðsveitari tekur sær av at fáa uppseting tillagaða og snøgga, men ikki arbeiðir við at broyta tekst.**

**51** Brá, Aliskipanin og Labvantage
Viðvíkjandi Brá, Aliskipanini og Labvantage: Skulu hesar skipanir bert hava týðiligar snarvegir/leinki frá hfs.fo, ella er ynski um djúpari integratión?

**Svar: Atgongdin skal vera ein leinkja, ikki integratión**

**52** Millumservarin hjá Landsneti
Viðvíkjandi millumservaranum hjá Landsneti: Er hesin longu settur upp, ella skal tað vera partur av veitingini at fáa hann settan upp og kláran til heimasíðuna?

**Svar: Sjálvur millumservarin verður veittur av KT landsins umvegis teirra veitara. Tekniska ábyrgdin (at hann koyrir, trygd osv) liggur hjá teimum. Servarin er uppræettaður, men er ikki uppsettur. Sjálv uppseting av servaranum, so hann megnar at taka ímóti dátum frá journalskipan og aliskipan, og heimasíðan kann lesa dátur haðani, er ábyrgdin hjá tilboðsveitaranum.**

**53** Ábyrgd fyri tekniskari uppsetan
Hvør hevur ábyrgd av teknisku uppsetingini kring dátur úr journalskipanini og Aliskipanini, t.d. API, atgongd, certifikat og rakstur? Skulu vit bara integrera móti einari klárari dátukeldu, ella skal hetta eisini vera partur av veitingini?

**Svar: Sum útgangsstøðið verður vænta at heimasíðuveitarin fær dátur úr journalskipan og aliskipan, sum eru klárar at taka ímóti á millumservaranum, sum tilboðsveitarin sjálv setur upp. Evt. er neyðugt við konvertering av formati frá t.d. xml>Json, hjá tilboðsveitaranum. Sí tó eisini svar til sp. 21 og 17.**

**54** Listar í fyrstu útgávu
Hvørjir listar skulu vera við í fyrstu útgávu, og hvussu nógvir listar er talan um tilsamans?

**Svar: Sí fylgiskjal við yvirlit yvir listar**

**55** Grafar, kort og PowerBI
Skulu grafar og Føroyakort byggjast sum partur av heimasíðuni, ella verður talan um PowerBI-rapportir/kortloysnir, sum HFS útvegar og sum heimasíðan vísir?

**Svar: Grafur við lúsatølum verður veittur úr aliskipanini. Møguligar Power BI- frágreiðingar verða sum útgangsstøðið mentar av HFS. Um tær verða mentar av øðrum, er hetta eftir avtalu og gjald til viðkomandi veitara. Kortdátur verða eftir ætlan fingnar til vega frá Umhvørvisstovuni, møguligur lisenskostnður verður avgreiddur millum US og HFS. Um hetta ikki letur seg gera, kann einfaldari kortloysn (t.d. powerBI) setast upp, ið vit rinda fyri serskilt ella fáa annan veitara at menna, og tilboðsveitaran at integerar á heimasíðuna.**

56 Leitifunktión
Skal leitifunktiónin eisini leita í innihaldi í PDF, Word, Excel og øðrum skjølum? Og eru eksternar leititænastur loyvdar, ella skal leitingin koyra á Landsneti? SKAL LN SPYRJAST UM LEITING

**Svar: Leitingin skal kunna leita í skjølum, sum pdf og word, ið liggja á heimasíðuni. Tó, um talan er um skannaðar fílur (oftast eldri tilfar), sum krevja tekstkenning, so er ikki neyðugt at hesi eru við í leitingini. Eksternar leitifunktiónir eru loyvdar, um hesar liva upp til trygdarkrøv hjá KT landsins**

57 Talgild oyðubløð og SQL-databasi
Viðvíkjandi talgildum oyðubløðum: Skal heimasíðan sjálv senda útfyltar formularar til SQL-databasa? Er hesin partur av veitingini hjá veitaranum, ella hava tit longu ein databasa til hetta endamálið?

**Sí svar 34, 35 og 36. Men fyri at taka samanum, so er tað vit ynskja:**

- brúkaran skal kunna **fylla oyðublaðið út á heimasíðuni**
- kunna brúka **treytað felti**
- kunna **leggja skjøl/fílur við** og hesi skulu kunna vera treyta
- kunna senda oyðublaðið inn talgilt
- møguliga kunna **vátta telefonnummar við SMS**
- HFS skal kunna **móttaka innsendu upplýsingarnar**
- loysnin skal vera gjørd soleiðis, at dáta **seinni kunnu goymast í SQL-databasa**
- og seinni er ætlanin, at oyðubløðini møguliga skulu kunna **journalførast automatiskt í journalskipanini**.
  Hetta seinasta er tó ein **framtíðar-/menningarmøguleiki**, ikki krav um fyrstu veiting.

58 Gjaldsloysn
Skal gjaldsloysnin príssetast sum optión uttanfyri høvuðstilboðið, ella skal hon vera partur av samlaða kostnaðinum?

59

**Svar: Vit ynskja at vita hvat skal til og kostnaðin fyri hetta, tvs. ikki sum partur av høvðustilboð, men sum ein eyka funktión. Sí eisini sp. 61.**

60 Enskt innihald
Skal enskt innihald vera partur av fyrstu útgávu, og hvør hevur ábyrgd av týðingum?

**Svar: sí ensku útgávuna av verandi hfs.fo. Tað er ikki prioriterað at byja við at útbyggja enska partin. Men verandi enski partur skal yvirførast á nýggju heimasíðuna. GG! At tann eini listin, sum eisini er á føroyskum, her er tøkur í enskari versión. HFS stendur sjálvt fyri umseting.**

61 Trygd og SLA
Viðvíkjandi trygd og SLA: Skal veitarin sjálvur standa fyri penetration test, restore/recovery test og trygdarváttan, ella verður hetta gjørt í samstarvi við Landsnet/KT Landsins?

**Restore/recovery og trygdarváttan av applikatiónum stendur veitarin fyri. Tá tað kemur til infrastruktur og servara stýriskipanir eigur KTL ábyrgdina saman við sínum veitarum (Formula og Elektron).**
**Viðvíkjandi penetratión test, sí sp. 7 til 10.**

62 Optiónir og meting av tilboði
Tá tilboð verða mett, verða optiónir sum gjaldsloysn, AI-kjattbotur og talgild oyðubløð roknaðar við í samlaðu metingina, ella verða tær mettar fyri seg?

**Svar: Prísmetingin á 50 % er við útgangsstøðið í grundtilboðnum, t.v.s. uttan tað sum er sett sum møguligar funktiónir seinni (A.I. kjattbott, gjaldsfunktión). Vit ynskja tó, at heimasíðan reint teknist er før fyri at fáa hesar eykafunktiónir. Prís og góðskumeting av møguligum eykafunktiónum verða tikin við, um tilboðsveitarar annars liggja javnt.**

**Talgild oyðubløð verða roknað við í samlaðu metingina, men automatomatisk upploadan í journalskipanina, verður roknað sum menningarmøguleiki.**